Jón Kragesteen, Ráðið fyri Ferðslutrygd:

# Alt ov lítið gjørt



**Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, viðgongur, at alt ov lítið hevur verið gjørt við tunnlatrygd í Føroyum**

TRYGD OG TUNNLAR
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit noyðast at viðganga, at Ferðslutrygd hevur ongan skipaðan politikk viðvíkjandi hesum máli, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Jón Kragesteen heldur, at ofta mál verða ofta ikki tikin upp, fyrr enn ein loysn er í eygsjón, og júst í hesum sambandi er ongin loysn enn. Hetta er so eitt mál, har nógv verður tosað um tað, men onki verður gjørt.

Men tó so, málið er ikki nýtt. Fyri nøkrum árum síðani hevur tað verið frammi, men sum við so mongum øðrum, er tað dottið burtur millum.

Leiðarin á Ferðslutrygd heldur, at ferðslutrygd stendur eitt sindur á síðulinjuni hesum økinum viðvíkjandi.

– Hetta er ein nokkso tekniskur spurningur. Ráðið fyri Ferðslutrygd er ikki ein eftirlitsstovnur, men heldur ein stovnur, sum upplýsir og ger fólk varug við trupulleikar, greiðir Jón Kragesteen frá.

Sosialurin mælti í oddagrein í farnu viku til, at gera eina ráðstevnu og trygd og tunnlar. Hvat heldur leiðarin á Ferðslutrygd um hetta hugskotið?

– Ein ráðstevna hevði verið fín, sigur Jón Kragesteen at enda.

# Klaksvíkingur keypt fyritøku í Sydney



Klaksvíkingurin, Jákup Mortensen, keypti 1. desember 2001 donsku fyritøkuna hjá Louis Poulsen í Sydney, Australiu.

Jákup Mortensen er 44 ára gamal, giftur við Tanyu, sum er úr Libanon og uppvaksin í Sydney.

Í 1977 tók Jákup sveinaroynd á bedingini í Klaksvík, og arbeiddi eftir tað, sum sjálvstøðugur bilmekanikari. Í 1985 tók hann prógv sum maskinverkfrøðingur á Københavns Teknikum. Hann fekk beinanvegin starv hjá Louis Poulsen, og árið eftir varð hann settur sum menningarverkfrøðingur.

Frá 1989–90 starvaðist hann sum projektleiðari hjá fyritøkuni, sum síðan útnevndi hann til konstruktiónsstjóra. Í 1993 varð hann tekniskur stjóri á deildini í Miami, Florida og í 1997 fyristitingarligur stjóri á deildini í Sydney, og hevur hann røkt hetta starv fyrimyndarliga, til hann tann 1. desember sjálvur keypti fyritøkuna, sum hann nú rekur við 6-7 øðrum fólkum í starvi.

**-ib**

## Horvin kvøldmynd

Bleikur fór dagur í trongløgdum skotum
Glerið av grótgalvun gyllir
Guandi kavin av brekkutrom
lágir og gilini fyllir
Brakar í frostløgdum bygdatúnum
varliga fólkini feta.
Neyt verða mjólka, – hoyggj er at geva
og vatn fyri heimaseyð seta.

Her berast minnir á snjóløgdum gøtum
við børnum á sleðum – á strúkandi ferð.
Skráandi menn undir lágættarskjøldrum
Meyla um seyð – og hvat rákið nú er
Ein stendur stillur – annar smátt vaggar
Pætur er gamal at húsum rann raggar
Frosið hvørt fet sum hann heim eftir ber
og skráin hin síðsta væl upptugd nú er.

Ísbláur himin í glampandi vaðið
hvar finnist upphav og endi –
spyrjandi her hava ættirnar staðið
Svarið tey ongantíð kendu.
Grunda og hugsa – stillan slær hjarta
á hesum kvøldkvirru løtum
Kloddut er skýferð – um farandi mána
glámlýsið leingist á gøtum.

Nú glitrar himin í Guðanna glæmu
foldin er linhvít ein ljómandi dýrd.
Tøgn er á teigum sum snjófrostið fjalir
ættin køld strýkur av norði væl stýrd.
Skamt undir bakkanum vestfallið rennur
vælkent tað sjóðið frá barnsbeini er.
Høgættin mennist og stjørnurnar fækka
Fánaður dagur – til nátt vorðin er.

Uppi í Trøð – við aldarskiftið

**Viggo Johannessen**

# Onnur eiga økið

TRYGD OG TUNNLAR
*Ingrid Bjarnastein*

– Arbeiðseftirlitið umsitur arbeiðsumhvørvislógina, og vit hava ikki verið inni á málinum um tunnlatrygd, sigur stjórin á arbeiðseftirlitinum, Karl Joensen.

Millum annað í Danmark er tað ikki heilt ókent, at tá til dømis Stórabeltsbrúgvin varð bygd, kom arbeiðseftirlitið inn og segði, hvat varð kravt fyri, at brúgvin skuldi vera nóg trygg.

– Hetta økið liggur nærri brunaumsjónini, heldur Karl Joensen. – Vit hava ikki verið eftirspurdir á hesum økinum og vit hava heldur ikki gjørt nakað krav uppá nakað tílíkt. Vit seta ikki nøkur krøv tá tunnlar verða bygdir, og um eftirspurningur skuldi verið eftir okkum, haldi eg ikki, at í fyrstu syftu er ikki so nógv hjá okkum at gera við tað. Hesin trupulleikin fer longur inn í aðrar lóggávur enn tær, arbeiðseftirlitið umsitur.

# TUTL: 25 konsertir

KONSERTIR
*Tíðindaskriv*



Í samband við, at Plátufelagið TUTL fyllir 25 ár í 2002, verður skipað fyri ymsum tiltøkum gjøgnum alt árið.

Longu í næstu viku verða tríggjar fjølbroyttar og áhugaverdar konsertir á skránni. Hesar konsertirnar eru skipaðar í samstarvi millum TUTL, Grót og Norðurlandahúsið.

Luttakandi nøvnini verða: Týr – geva sína fyrstu fløgu út 10. januar.

Hatespeech – Eru av álvara byrjaðir at spæla aftur eftir drúgvan dvala

200 – Føroya einasti punkbólkur.

Mold – Endiliga, fyri teir mongu Mold fjepparanar, er møguleikin aftur at hoyra teir.

Kári Sverrison – Fólkatónleikur í heimsklassa.

Pete Tilly & Brian Gillingam – Annar úr Onglandi, hin úr Írlandi, spæla ljóðføri úr Australia og Afrika: didgeridoo, bongo, djembe osfr.

Konsertirnar eru hesar:

Hóskvøldið 10. januar kl. 20.00. Glyvrar - Støkkhøllin (Glyvra Bio), Clickhaze, Týr, Kári Sverrison, Pete & Brian. Kostnaður: 80 Kr

Fríggjakvøldið 11. januar kl. 22.00 Tvøroyri - TB-húsið, Týr, Hatespeech, Clickhaze, Pete & Brian. Kostnaður: 100 Kr

Leygarkvøldið 12. januar kl. 19.30 Tórshavn – Norðurlandahúsið, Hatespeech, 200, Clickhaze, Týr, Mold, kostnaður: 125 kr.

# ítróttur

Nr. 4 • týsdagur • 8. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-KÍF 27-26 (12-13):

# Eljustríð um bronsuna



*Sjálvt um bronsan nú er í eygsjón hjá Kyndli, so mundi lættin við at sleppa undan absolutta botnsessinum viga meira í fyrsta umfari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil gjørdist nýggjasti parturin í bronsustríðnum, tá teir í einum sera spennandi dysti bastu kollfirðingum. Bert tvey stig skilja nú tey fimm liðini, sum stríðast um seinasta heiðursmerkið**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Tað er so langt ífrá, at tey í Kyndli hava havt nakrar stórvegis hugsanir um heiðursmerki hetta kappingarárið. Kanska hava tey tað heldur ikki enn, men soleiðis sum kappingin í bestu mansdeildini hevur lagað seg, so viðførdi bert triði sigurin á árinum, at Kyndil nú bert er tvey stig frá bronsumerkjunum.

**Kreppan er steðgað**

Kreppa er í Kyndli. Kyndil er á niðasta plássinum. Liðið er ov veikt.

Bert nøkur av teimum heldur óvandu – fyri ikki at siga margháttligu - hugtøkum, sum, áskoðarar hjá sigursvanda havnarfelagnum hava bæði hoyrt og sagt seinastu mánaðirnar.

Sunnudagin hevði liðið so ein møguleika at børa nakað um hetta, tá kollfirðingar komu á vitjan, men fyrstu løtuna av dystinum var so avgjørt ikki serliga nógv, sum bendi á, at hetta skuldi broytast.

Gestirnir fóru nevnliga til stroks frá fyrsta bríksli, og til tíðir var nærum undrunarvert, hvussu lætt tað sá út hjá kollfirðingum móti illa skipaða kyndilsliðnum.

Eitt harðliga triltrongt time-out fekk tó heimaliðið at skipað seg betri í verjupartinum, og spakuliga fóru teir undir at toga seg uppeftir. Serstakliga koma betri skil á verjupartin, soleiðis at Johan Danielsen í málinum fekk betri arbeiðsumstøður.

Tað eydnaðist ikki Kyndli at vinna seg upp á javnt undan steðginum, men við einum máli á muni, var dysturin nú aftur víðopin, og tá so Kyndil legði bragdliga fyri í øðrum hálvleiki, gjørdust áskoðararnir á Hálsi meira harðmæltir, enn teir annars hava verið í vetur.

Munurin gjørdist tó ongan tíð stórur, og liðini bæði skiftust eisini um at hava leiðsluna, tað sum eftir var.

Kanska hildu kollfirðingarnir, at teir høvdu stigini í posanum, tá teir fimm minuttir fyri leiklok løgdu seg tvey mál framum, men teir gloymdu at binda fyri. Ístaðin treiskaðist Kyndil og skeyt fýra mál á rað, meðan kollfirðingar hesa løtuna tóktust púrasta ráðaleysir, og so var fyrsti sigurin í endaspælinum veruleiki.

**Hornasteinarnir styrktir**

Tó at tað sum nevnt nú bert eru tvey stig upp til bronsuna, so mundi sigurin fyrst og fremst kennast sum ein lætti hjá illa sperdu kyndilsmonnunum.

Liðið er ikki longu isolerað í botninum, og sjálvt um bronsan nú er í eygsjón, so mundi tað at sleppa undan absolutta botnsessinum viga meira í fyrsta umfari.

Spurningurin er so, hvørt liðið megnar at halda fast um góðu gongdina, og mett eftir hesum dystinum, so eigur hetta so avgjørt eisini at vera gjørligt.

Eftir eitt heyst, sum umframt vánalig úrslit eisini beyð upp á nógvar skaðar, so tykist hópurin nú spakuliga at vera komin fyri seg. Hesa ferð var Heini Bendtsen aftur at síggja, eftir at ein knæskaði hevur darvað honum í grundspælinum, og fyri stríðsviljan á liðnum er tað eitt stórt pluss, at Hans Andrias Dahl nú aftur er farin undir hondbóltin.

Við Bárði Johannesen, Johan Danielsen og Jónleifi Sólsker eru týdningarmiklu royndirnar eisini í lagi, men týdningarmesti parturin av liðnum í løtuni eru kanska teir báðir, Janus Einar Sørensen og Høgni Klein.

Ikki minst er Høgni eitt slag av primus-motor á liðnum, megnar hann framhaldandi at sýna sama stórspæl, sum hann gjørdi hesaferð, so kann so væl henda seg, at endaspælið verður nakað væl hugaligari enn grundspælið hevur verið. Ikki minst, um sami stríðsviljin fer at eyðkenna avrikini í komandi dystunum.

**Sjálvsálit**

Kollfirðingar gjørdust soleiðis ov stuttir hesaferð, og hetta við at missa í avgerandi løtunum av dystinum er mest sum blivið eitt kompleks hjá liðnum.

Í øllum førum er hetta høvuðsorsøkin til, at liðið ikki hevur vunnið sær eini hægru endastøðu í grundspælinum, og hesin dysturin gav so ongar ábendingar um, at nakar bati er at hóma.

At venda eini slíkari gongd er fyrst og fremst ein spurningur um sjálvsálit. At leikararnir vita av, at teir eru nóg góðir at vinna dystirnar. Og tað átti heldur ikki at verið nøkur vónleys uppgáva at sannført teir um hetta. Heilt ofta hava teir verið nóg góðir í 55 minuttir, so fimm minuttir frá ella til skuldu ikki gjørt tann stóra munin.

**Dysturin í tølum**

**Kyndil-K´FI 27-26 (12-13)**

Málskjúttar:
Kyndil: Høgni Klein 7, Jónleif Sólsker 6, Janus Einar Sørensen 5, Bárður Johannesen 5, Regin Johannesen 2, Leif Mikkelsen 1, Heini Bendtsen 1, Hans Andrias Dahl 1
KÍF: Iljan Topic 9, Durica Tomic 5(1), Jákup Dam 4(1), Kristian Madsen 4, Petur Martin Poulsen 2, Regin Petersen 2
Brotskøst: Kyndil 1, KÍF 3
Útvísingar: Kyndil 4, KÍF 1
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Hóast einstøk ivamál vóru, so var heildaravrikið á hædd við støðið, sum teir vanliga leggja.